## Andstøðan greitt frammanfyri

Hevði fólkatingsval verið í dag, hvødu andstøðuflokkarnir vunnið. Ein kanning, sum Capacent hevur gjørt fyri danska kringvarpið, vísir, at sigurin hjá andstøðuni hevði verið uppaftur størri, enn aðrar kanningar í vetur hava víst. Eftir teirri nýggju kanningini høvdu andstøðuflokkarnir fingið 92 tinglimir og stjórnarsamgongan 83. Politiska framsøgukvinnan hjá Konservativa Fólkaflokkinum, Henriette Kjær, væntar, at nógvir danir fara at broyta áskoðan, tá teir fáa løn næstu ferð og síggja ágóðan av skattalættanum hjá stjórnini.



## Fólkaatkvøða um kvotuskipanina

Tað err ikki óhugsandi, at íslendingar skulu á fólkaatkvøðu at taka støðu til, hvørja fiskiveiðiskipan landið skal hava. Fíggjarmálaráðharrin, Steingrímur J. Sigfússon, segði í einari útvarpssamrøðu í gjár, at spurningurin um verandi kvotuskipan stingur seg upp undan hvørjum altingsvali, og at kjakið tá vísir, at fólk eru rættiliga ósamd um, hvørt verandi skipan er tann rætta ella ikki. Eitt uppskot er um at býta kvotuna, soleiðis at ein triðingur verður seldur á marknaði og ein triðingur latin bygdunum. Sjálvur tekur fíggjarmálaráðharrin undir við hesum tankanum, sigur hann.

# Børnini inn í nýtt tíðarskeið



*Omman kom við Bárði, tá ið hann mánadagin varð innskrivaður í skúla í Havn*

**Í hesum døgum er innskriving til 1. flokk kring landið, og tað er ein stórhending í lívinum hja skúlabúnu børnunum**

SKÚLI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Innskrivinginin av børnum til fyrsta flokk hevur verið longu á fleiri skúlum, og aðrir hava innskriving hesa vikuna.

Mánadagin og í dag var innskriving til allar skúlarnar í Tórshavnar kommunu, og beinanvegin var fult av fólki á hurðinum á býráðssalinum á Vaglinum.

Børnini komu saman við øðrum foreldrunum ella báðum, og í onkrum føri var omman við.

Hetta var ein stór løta fyri børnini, sum vóru høvuðspersónarnir, og fleiri errin foreldur avmyndaðu løtuna.

Við borð sótu skrivstovukvinnur við spurnarbløðum, og børnini vóru spurd um navn, føðingardag, navn á foreldrum, bústað og telefonnummar. Stóð á hjá onkrum at vita, hjálptu foreldrini.

Hvørt barn fekk bókina Myndir í myndum, og gummibomm stóðu á borðunum til børnini, sum nú skjótt skulu trína inn um skúlans gott og helst kenna seg vælkomin.

305 børn í Tórshavnar kommunu hava aldur til at fara í skúla í ár.



*Poulina og hini komandi børnini í fyrsta flokki fingu øll eitt eintak av Myndir í myndum*

# Havnafútin spardur burtur

**Nú lítil skipaferðsla er, og kommunan skal spara, hevur Sands kommunan sagt havnafútanum upp**

UPPSØGN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sands kommuna hevur ongan havnafúta longur.

Í fjør var havnafútin gjøgnum fleiri ár sagdur upp og fór frá 1. januar.

Brandur Sandoy, borgarstjóri á Sandi sigur, at orsøkin er, at skipaferðslan er so lítil. Bara eitt skip, Eysturskipin, kemur inn á sandi, og arbeiði er ikki til at hava ein havnafúta í fulltíðarstarvi.

Tað kom ongantíð upp á tal, at frásetti havnafúti kundi halda fram og arbeiða niðursetta tíð, sigur Brandur Sandoy.

Tá ið kommunan í sínari tíð setti havnafúta, komu nógv skip og bátar inn í Havnin, men nú er lítið virksemi í Havnini.

Kommunan hevur sett mann at røkja ein part av uppgávunum, sum havnafútin hevði, men tað er bara ein fyribils loysn. Hugsanin er at biðja onnur starvsfólk hjá kommununi um at átaka sær uppgávurnar.

Fleiri kommunur hava havnanevnd og reglugerð fyri havnir sínar. Sand kommuna hevur ikki longur nakra havnanevnd, og reglugerð finst eingin. Í flestu førum verður kravt, at havnafútin ella havnameistarin hevur navigatørútbúgving, soleiðis at hann kann eitt nú flyta skip.

### Eingin lóg er fyri økið

Eina ferð var uppskot gjørt,



men tað varð ongantíð samtykt.

- Hatta er eitt svart hol í lóggávuni, og sum er hava kommunar sjálvar ábyrgdina, tí tær eiga flestu havnirnar, sigur Ewald Kjølbro, leiðari á havnadeildini hjá Landsverki.

Nú er tað bara sjálvt kommunustýrið á Sandi, sum hevur ábyrgdina av skipum og bátum í Sands havn.